# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

BILRØKT
Borgar fyri góðsku...



**Hesin flotti Jaguar XJ6-4.2**
verður seldur um hóskandi boð fæst. Bilurin er í sera góðum standi. Altíð koyrt í Føroyum, fyrstu ferð skrásettur 21. juni í 1978. Hevur einans koyrt 28.400 km. Hevur aut. gear, el rútar, leðursetur, servo, klima, træinteriør o. a. Fá meira at vita um bilin hjá Bilrøkt í Havn

Stiðjagøta 3 - Postsmoga 1234 - tel 588880 - fax 318380
www.bilrokt.fo - bilrokt@bilrokt.fo

# Brúktir íslendskir bilar á netinum

**Nú er latin upp ein nethandil, har góðir brúktir íslendskir bilar standa til sølu**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



Fíggjarkreppan í Íslandi hevur fleiri óhepnar síður við sær fyri íslendingar. Men fyri onnur ber kreppan okkurt meiri heppi við sær.

Í gjár lat ein nethandil upp, har góðir brúktir íslendskir bilar standa til sølu. Netsíðan umfatar allar størri íslendskar bilasølur, so tað er lætt at finna øll sløg av bilum, sum finnast á brúktbilamarknaðinum.

Orsakað av fíggjarligu kreppuni í Íslandi, og krónukursinum, sum er kavaður heili 70% mótvegis ávísum øðrum valutaum, ber til at fáa fatur á luksusbilum í Íslandi til ótrúliga lágar prísir.

Brúktbila heimasíðan hjá HEKLA Icelandic gevur atgongd til fleiri enn 600 brúktar bilar, og HEKLA hjálpir enntá ókeypis til at fyriskipa flutningi av bilunum og at rokna út, hvat flutningurin kostar.

Í vikuni, sum nú fer aftur um bak, hevur HEKLA útflutt brúktar bilar til Føroya, Noregi, Danmark og Svøríki.

Netsíðan www.nordic-carsale.is) er opin fyri bæði fyritøkum og privatum, og síðan svarar til blocket.se í Svøríki.




# Fyrilestrar um kreppu og gransking

**Á landsfundi Fólkafloksins í morgin fer Johnny í Grótinum at halda fyrilestur um fíggjarkreppuna, meðan Pál Weihe heldur fyrilestur um vinnuligar møguleikar í gransking**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fólkaflokkurin hevur landsfund í bygdarhúsinum í Kollafirði í morgin, og á fundinum verða tveir fyrilestrar.

Johnny í Grótinum, búskaparfrøðingur og leiðari av Føroya Banka í Danmark, fer at halda fyrilestur um alheims fíggjarkreppuna, sum hevur rakt íslendingar serliga meint.

Hin fyrilesturin ber heitið »Vinnuligir møguleikar í gransking«, og er serliga viðkomandi nú vit júst hava havt vitjan av umboðum fyri EFTA sum sóu, at Føroyar hava annað og eiri at bjóða upp á, enn fisk. Tað verður Pál Weihe, sum fer at halda tann fyrilesturin.



*Annika Olsen umsitur kommunumál, sum óivað fáa drúgva umrøðu á landsfundinum, nú kommunuval er í hondum*

Eftir bert sjey mánaðum í andstøðu, var aftur boð eftir Fólkaflokkinum til landsins leiðslu, og hetta fer uttan iva at seta dám á landsfundin. Eisini stendur kommunuval fyri durum, og tí kann eisini roknast við, at kommunupolitikkur fær rúmd á fundinum, eisini tí, at landsstýriskvinna floksins, Annika Olsen, umsitir kommunumál.

**Skráin til fundin er henda:**

kl 09.30: Morgunmatur
kl 10.00: Formansfrágreiðing
Fyrst Jørgen Niclasen, formaður, síðani fara landsstýrisfólkini at greiða frá sínum málsøkjum og at enda tingfólk.
kl 12.00: Døgurði
kl 13.00: Johnny í Grótinum, búskaparfrøðingur: »Fíggjarkreppan og búskaparstøðan í Føroyum«
kl 13.30: Pál Weihe, yvirlækni og granskari:»Vinnuligirmøguleikar í gransking«

Eftir fyrilestrarnar verður orðið frítt, har fundarfólkið fær møguleika at seta spurningar og gera viðmerkingar.

Um kvøldið verður døgurði.

Frá Javnaðarflokkinum

Landsfundurin verður á Tekniska skúla í Klaksvík 14. og 15. november.

Javnaðarflokkurin

Sosialurin -har tað hendir